## John Petersen setti punktum




Leygardagin spældi Skive seinasta dystin í Danmarksseriuni í hesum kappingarárinum. Undan seinasta umfari hevði liðið tryggjað sær uppflyting til 2. deild, men punktum varð sett við einum málríkum sigri í Grenå. Tað gekk lívliga aftur og fram, men endin var, at Skive vann dystin 5-3. Seinasta málið í dystinum skoraði føroyski John Petersen tveir minuttir fyri leiklok.

## Fult til Fótbóltsskúlar

Áhugin fyri árligu fótbóltsskúlunum hjá Fótbóltssambandinum er sera stórur. Tað er longu einar tvær vikur síðani, at boðað varð frá, at tað var fult til skúlan á Toftum. Og undan vikuskiftinum boðaði FSF so frá, at øll plássini eisini eru umbiðin til Fótbóltsskúlarnar í Havn og í Sandavági. Seinastu plássini á einum FSF-fótbóltsskúla eru at finna á skúlanum, sum verður hildin í Vági.

# Brúðgommurin á máltalvuna

**Talan var um fína upphiting til brúdleypið hjá eldra beiggjanum, tá Samuelsen-menninir hjá EB/Streymi løgdu fyri við málskjótingini sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir hjá EB/Streymi noyðist eftir øllum at døma at vera Ronnie Samuelsen fyriuttan, tá teir komandi sunnudag skulu spæla útidyst móti Skála.

Brúdleyp stendur nevnliga á skránni hjá víkamanninum, og so má fótbóltur vera fótbóltur fyri eina tíð. Eisini hóast brúðgommurin er ein sera týðandi partur av EB/Streyma-miðvøllinum, sum sunnudagin skal dystast móti Skála. Og í verandi støðu er hvør einasti dystur so sera týdningarmikil partur av oddastríðnum.

Men hóast støðuna á talvuni, so vil Ronni ikki staðfesta, at brúdleypið varð lagt øðrvísi, um hann hevði vitað av góðu støðuni, sum liðið nú er í.

– Vit løgdu ætlanirnar longu í januar mánaði. Og tað er ikki bara sum at siga tað, um høli skulu finnast til slíkar veitslur. Sjálvandi royndi eg at finna okkurt hol í kalendaranum, men tað var nú ikki fyrr enn í juli, og tá var eingin kjansur at finna nøkur høli. Skuldu vit bíða longur enn hetta, so var tað ikki fyrr enn í september, og so leingi vildi komandi konan ikki bíða, sigur hann flennandi.

– Men sjálvandi er tað keðiligt, at eg ikki fái verið partur av dystinum. Eg má bara vóna, at tað ikki fer at stilla liðið verri til dystin. Klára teir at vinna á Skála, so fer tað at siggja hampuliga gott út hjá okkum. Og undir øllum umstøðum eru allir spælararnir bodnir í brúðarhús sunnudagin. Teir eru sjálvandi eisini við í brúdleypinum, men tá eru teir vónandi meira róligir, sigur altso Ronnie Samuelsen.



*– Sjálvandi royndu vit eisini at flyta dystin móti Skála, men tað vísti seg ikki at vera møguleiki fyri, sigur komandi brúðgommurin*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

EB/Streymur-VB/Sumba 4-0 (3-0):

# Funnu lættliga á toppin

*EB/Streymur*

*VB/Sumba*

**EB/Streymur høvdu ikki stórvegis trupulleikar av heimadystinum móti VB/Sumba, sum ikki megnaði at fylgja fína úrslitinum seinast upp**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Gert Hansen og liðfelagarnir høvdu lætt spæl, tá teir sunnudagin vunnu seg aftur á oddasessin í Formula-deildini*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

So er EB/Streymur aftur oddaliðið. Uttan stórvegis hóvasták megnaði samansett liðið at basa gestunum úr VB/Sumba, og í góðveðrinum, sum var kring alt landið, kundu Eiðisfólk staðfesta, at tey pt. eiga sterkasta fótbóltsliðið í Formula-deildini.

### Fingu lítlan hvøkk

Tað lá mest sum alla tíðina í luftini, at talan ikki skuldi verða um annað enn tryggan heimasígur.

Gestirnir løgdu seg frá byrjan langt aftur á vøllin, men hóast teir soleiðis royndu at tippa fyri gjøgnumspældum mótstøðuálopum, so var talan um rættiliga greiða yvirvág til heimaliðið.

Hinvegin sýndu gestirnir tó eisini, at teir hava dygdir í kontraspælinum. Nakrar ferðirnar royndu teir at spæla skjótt niðaneftir, og ta einu ferðina mátti René Tórgarð í EBS/treymamálinum taka tvørtræið til hjálpar, tá Birgir Jørgensen langaði til.

Fyrri hálvleikur var tó ikki hálvrunnin, áðrenn EB/Streymur fekk hol á, tá Hans Pauli Samuelsen fylgdi skoti frá Sorin Anghel upp, og so var at kalla leyst og liðugt. Málið gav vertunum neyðuga friðin til at seta seg á dystin, uttan at teir kortini vágaðu alt ov nógv frameftir, og tí fekk VB/Sumba ikki longur koyrt ætlaða kontraspælið.

### Skotvenjing

Restina av fyrra hálvleiki gjørdist talan mest sum um skotvenjing móti málinum hjá VB/Sumba. Ronnie Samuelsen økti til 2-0, eftir at Marcin Dawy í fyrstu atløgu hevði vart fyri stútara frá Egili á Bø. Bárður Olsen økti til 3-0 við frálíkum langskoti, og Egil á Bø rundaði av, tá hann sendi innlegg frá einum sera væl uppløgdum Knút Vesturtún í kassan.

Eftir steðgin var talan tó ikki um somu álopskolu móti vitjandi liðnum. Við trimum – og síðani fýra – málum í skjáttuni, hevði EB/Streymur ikki tørv á at leggja alt ov nógv fyri, meðan VB/Sumba ikki tóktist áhuga í at tveita serliga nógv fólk frameftir, og á tann hátt lata verjuna meira upp enn tað sama.

### Kunnu styrkja støðuna

Sigurin lyftir EB/Streym upp aftur á oddasessin, sum teir ikki hava átt seinastu vikuna, og vil væl til, kunnu teir seta seg enn tryggari á hendan komandi vikuskiftið. Tá skal EB/Streymur á vitjan á Skála, har heimaliðið tó tykist vera um at koma fyri seg eftir eina meira enn trilvandi byrjan upp á kappingarárið. Undir øllum umstøðum verður tá neyðugt við hægri effektiviteti frá EB/Streymi, sum misnýtti hópin av møguleikum sunnudagin, men soleiðis vil ofta verða, tá talan er um einvegis ferðslu størsta partin av dystinum.

VB/Sumba skal tá spæla stevnudyst móti B68, og tá er kravið heilt einfalt trý stig, um liðið skal gera sær vónir um at leggja seg í oddin aftur.